# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2**

*Fyrsta Bilradio eftir summarsteðgin verður sent komandi hósdag tann 27. august*




*Raðkoyring við ellisakførum á veg heim í býin*

# Raðkoyring við ellisakførum

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

At ellisakfør koyra raðkoyring gjøgnum miðbýnum og t.d. steðga á við eina kafé er vanlig sjón í nógvum býum kring um í heiminum, serliga um summarið. Soleiðis var eisini í Havn hóskvøldið í farnu viku, tá limir í Føroya Ellisakførum settu hvørjum øðrum stevnu á bilfyritøkuni Bilrøkt í Stiðjagøtu. Umframt limir úr Føroya Ellisakførum vóru eisini limir í danska veteranbilklubbinum “BMW Klub 367”, sum vitjaðu her við sínum ellisakførum.

Kvøldið byrjaði við eini hugnaløtu hjá Bilrøkt, har ellisakførini vóru sýnd fram afturvið einum kaffimunni, og síðan varð koyrt raðkoyring gjøgnum býin. Eftir tað steðgaðu bilarnir í Vágsbotni við uttandura restaurantina hjá Hvonn, har teir vórðu sýndir fram. Stórur áhugi var fyri bilunum, og nógv fólk støðgaðu á fyri at hyggja og fáa eitt bilprát við eigararnar.




*Framsýning av ellisakførum hjá Bilrøkt í Stiðjagøtu*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*




*Bilarnir steðgaðu á við uttandura restaurantina hjá Hvonn í Vágsbotni*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

## Ansið eftir børnunum

**Ferðslutrygd gevur góð ráð í sambandi við at nýggir næmingar eru byrjaðir í skúlunum kring landið**

Nú skúlarnir byrja aftur, vil Ráðið fyri Ferðslutrygd heita á bilførarar at vísa serligt varsemi í ferðsluni.

Eini 700 børn skulu á fyrsta sinni finna sær veg millum heim og skúla. Børnini eru lítil á vøkstri og kunnu tí vera trupul at síggja millum bilarnar. Tey skulu samstundis venja seg við at ferðast einsamøll í ferðsluni.

Góð ráð til foreldur eru at finna á:
*www.ferdslutrygd.fo*

